LM-045/2023

Fylgiskjal 9

SSP-Ráðgevingin

R. C. Effersøesgøta 26
FO-100 Tórshavn

27.29.2023

Att; Gudrun M. Nolsøe

Í samband við lógaruppskotini um kynsliga avnoyðslu og lokking, hevur SSP-ráðgevingin hesar viðmerkingar til greinarnar:

1. § 225, sum viðvíkur aðrar kynsligar gerðir enn samlegu, verður víðka til at fevna um

føri, tá ið gerningsmaðurin fær órættaða til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan.

Talan kann verða um aðrar kynsligar gerðir við onnur, og ikki einans við sær sjálvum. At fáa órættaða at fremja kynsligar gerðir við seg sjálvan ella onnur, kann helst lýsast hvussu gerningsmaðurin ger hettar.

Uppskot; við tvingsli, hóttanum ella á annan hátt, fær órættaða....

3. Nýggj § 229 verður sett inn kapittul 24, sum viðvíkur lokking. Ásetingin ásetir at tann

verður revsaður, sum miðvíst ella við snildir og við at misnýta sína yvirvág í aldri og

royndum byggir upp eitt samband til ein persón undir 18 ár við ætlan um at fremja

kynsligt brotsverk móti viðkomandi.

Mett verður ikki at aldurin ella royndir, neyðturviliga hevur týdning fyri um gerningsmaður lokkar.

Víst verður ikki til hvørjar royndir talan er um. Møguligt er, at gerningsmaðurin er ungur, javngamal og møguliga minni mentur, til at aldur talar fyri orsøkina til lokkan.

Royndirnar hjá órættaða, meta vit ikki má fáa týdning, tá talan er um ung undir 15 ella 18 ár.

Aðrar viðmerkingar:

Sextortion kann eisini hava við tær, at hóttanir og tvingsil, eru úrslit av hacking frammanundan. Á tann hátt hevur gerningsmaðurin ogna sær intimar myndir/ upptøkur, sum síðan verða nýttar at tvinga órættaða til kynsligar gerðir/senda fleiri myndir, senda pening og møguliga verður tvungin at lokka onnur aftrat. Hacking verður ikki nevnt sum ein háttur. Møguliga gott at fevna sindur breitt.

Um gerningsmaðurin t.d. í samband við samskifti við barnið ella tí unga fær tey til at senda myndir ella videoir við pornografiskum innihaldi, kann tað eftir umstøðunum revsast fyri brot eftir § 236, stk. 2 í revsilógini, sum viðvíkur kynsligt tilfar av persónum undir 18 ár. Revsingin er sekt ella fongsul í upp til 1 ár. Vit taka undir við, at revsikarmurin víðkast til sekt ella fongsul í upp til 2 ár. Men ynskiligt

LM-045/2023

er, men eisini at hugsa verður um viðgerð til gerningsmannin, og konfliktmægling millum partarnar. Serliga fyri órættaða, fyri at koma víðari. Mett er eisini um gerningsmaðurin fær tey ungu at senda myndir/filmsbrot, kann § um lokkan, leggjast aftrat brotinum.

Vinarliga

Daisy J. Iversen
SSP-ráðgevi
Tlf.+298 22 26 94
Teldupost: di@ssp.fo

Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi